# Eiga at kalla ein spaka fyri ein spaka

**Eru almenn starvsfólk dovin, ella er umsitingin ov dýr, eiga politikarar at leggja kortini á borðið og fortelja fólki, hvat vit skulu vera fyriuttan, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum**

ALMENN STARVSFÓLK
*Áki Bertholdsen*



*–Tað, sum varð sagt og skrivað, tá ið fíggjarlógin varð viðgjørd, vísir, hvussu tað ber til at biðurgerða og vanvirða tey, sum eru alment lønt, segði Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum á aðalfundinum*

– Halda tingmenn at nakað er galið við almennu umsitingini, eiga teir at leggja kortini á borðið og kalla ein spaka fyri ein spaka.

Gunnleivur Dalsgarð er formaður í Starvsmannafelagnum.

Og á aðalfundinum hjá felagnum leygardagin fanst hann hvassliga at tingmonnum fyri at vanvirða og niðurgerða almenn starvsfólk.

Hann hugsaði serliga um tað, sum varð sagt og skrivað, tá ið fíggjarlógin var til viðgerðar beint fyri jól.

– Sjálvdan hevur so nógv rok og buldur staðist av eini fíggjarlóg, segði hann.

## Ómetaliga lítla virðing

Gunnleivur Dalsgarð segði, at tíverri mátti hann ásanna, at viðgerðin av fíggjarlógini og orðaskiftið síðani hevur víst, hvussu ómetaliga lítla virðing og sóma, ávísir politikkarar, og onnur við, hava fyri fólkum sum starvast hjá tí almenna, bæði hjá landi og kommunum.

– Tosað verður um, hvussu vánalig og óvirkin hesi starvsfólk eru. Og ført verður mangan fram, at bara vit fáa minkað talið á teimum, og sostatt skera eina útreiðslu burtur, verður fíggjarliga støðan í landinum nógv betri.

Hann segði at undir fíggjarlógarviðgerðini varð nógv gor og gall oyst eftir almennum starvsfólkum.

– »Kjaftbreiðir« tingmenn hóreiggajðu sær óført og kendu sær ikki afturhald. Tú hevði varhugan av, at teir her veruliga vóru á heimavølli, sigur hann.

Og hann leggur afturat, at ikki minni kom hetta til sjóndar eini í útvarpssending aftaná, har bæði formaðurin í fíggjarnevndini og enntá eisini fakfelagsfólk, týðiliga vístu teirra niðurgerðandi hugsan mótvegis almennum starvsfólki.

– Tað tykist sum um at nøkur halda, at almenn starvsfólk bert eru ein kleppur, ið forðar fyri einum vælvirkandi fíggjarligum samfelag, segði Gunnleivur Dalsgarð á aðalfundinum.

## Eru ikki bangin

Formaðurin í Starvsmannafelagnum staðfesti eisini á aðalfundinum, at tey alment løntu eru ikki bangin fyri at fara undir at at kanna hvønn tørv og hvørja orku eitt samfelag, sum tað føroyska, hevur, um allar uppgávurnar, ið politiska valdið hevur álagt almennu umsitingini, skulu røkjast til fulnar.

– Sjálvsagt er tað ikki minst okkara áhugi, bæði sum starvsfólk og sum borgarar annars í samfelagnum, at arbeiðsplássini virka til fullnar og eru góð arbeiðspláss, sum kunnu vera við at skapa eitt gott samfelag hjá okkum øllum. Men hann segði, at tað er júst her at politikarar svíkja.

– Teir loypa á, har teir halda at garðurin er lægstur og royna at manipulera fólkahugsanina inn á sama sporið.

Og tíverri fáa teir góðan stuðul frá ávísum fakfelagskreftum, sum síggja alment sett starvsfólk, sum størstu pestina á lønar- og starvsøkinum í landinum.

– Tað tykist sum um at hesi hava tað uppfatan, at tað er hvørt einstakt starvsfólk, ið er høvuðsorsøkin til til, at vit hava eina dýra umsiting.

– Men tey gloyma, at einki fólk hevur sett seg sjálvt í starv, men at øll eru sett sambært reglum, ið politiska valdið hevur viðtikið.

Gunnleiv Dalsgarð segði, at er nakað galið við almennu umsitingin og er hon ov kostnaðarmikil er at leggja kortini á borðið og at kalla ein spaka fyri ein spaka.

– Hvat er tað, sum vit skulu verða fyri uttan ella hvat skulu vit minka: Er tað heilsuverkið, undirvísingina, almannaverkið, samferðsluna, toll- og skattaumsitingina, barnaansing, ítróttin, mentanina ella hvat?

Og hann legði afturat, at hví verður ikki hugt eftir, hvussu almenni bygnaðurin kann skipast betri, er hann bólgnaður?

– Hví verða fleiri aðalráð sett á stovn, styrkir tað ikki eina góða og virkna umsiting?

– Hví fáa dýrir, privatir ráðgevarar so nógv mál løgd at avgreiða, um almenna umsitingin er ov stór? Gunnleivur Dalsgarð segði, at tað eru nógvir ósvaraðir spurningar, sum vit hava krav at fáa svar uppá frá røttu viðkomandi, sum er politiska valdinum.

– Nú eiga løgtingslimir at vísa hvør dugur er í teimum, tá ið talan er um at broyta almenna byggnaðin og leggja kortini á borðið

– Higartil hava vit ongi boð fingið frá tykkum um hetta. Tað hevur bara verið orðavastur og hendan ótolandi niðurgerðingin av arbeiðnum hjá starvsfólkunum í almennari tænastu, segði formaðurin í starvsmannafelagnum.

## Rætti vegurin at ganga

Gunnleivur Dalsgarð segði, at tað er greitt, at landsstýrið roynir at prógva, at tað ber til at skipa Føroyar sum eitt samfelag við sjálvberandi búskapi, samstundis sum blokkstuðulin úr danska ríkinum verður minkaður og framyvir læstur fastur.

Hann legði afturat, at allir politiskir flokkar eru samdir um at fara undir at skipa samfelagið við einum sjálvberandi búskapi og tað má metast sum greiður boðskapur um, at vit ganga fram móti einum sjálvstøðugum Føroyum.

– Ongin ivi er um, at næstan øll eru samd um, at hetta er rætti vegurin at ganga. Ósemjan er meira um, hvussu skjótt skal farast fram og, hvussu hetta skal gerast.

– Heildarmetingin av fíggjarlógini er tengd at, hvussu hvør einstakur sær støðuna og um hann heldur, at rættvísur og skilagóður politikkur verður førdur.

– Men tað ber ikki til at tosa um, hvussu tú ætlar at menna heilsuverkið, at bøta um korini hjá teimum, sum eru ringast fyri, at menna útjaðarin, at útbyggja skúlaverkið, fyri at nevna nøkur átroðkandi mál, uttan at fíggjarligu fortreytirnar eru til staðar.

– Og tað er júst her, at vit mangan hava ilt við at síggja, at tað ber á rætta borið.

Gunnlevur Dalsgarð segði, at tað ørkymlar sjálvsagt borgarin at politiskar ætlanir, sum hava útreiðslur við sær, ikki síggjast aftur í fíggjarlógini, samstundis sum fíggjarnevndin greitt boðar frá, at óskilið við afturvendandi eykajáttanum er ein farin tíð.

– So her sær eisini út til at leka millum teori og praksis, segði hann.

Hann segði eisini, at skal eitt framkomið samfelag hava vónir um, at fáa samfelagshjólið at mala væl og skilagott, er neyðugt við eini góðari, virknari og tryggari umsiting.

Og hetta er ikki minni galdandi, um ætlanin veruliga er at seta fullveldi á stovn, segði formaðurin í Starvsmannafelagnum.



*Tey, sum halda, at almenni bygnaðurin er ov stórur og dýrur, skylda okkum eisini at siga, hvat skal broytast og hvat, vit skulu vera fyriuttan so at tað kann vera bíligari. Er tað heilsuverkið, skúlaverkið, ferðasambandið, almannaverkið ella okkurt annað, sum skal serjast, spurdi Gunnleivur Dalsgarð á aðalfundinum hjá Starvsmannafelagnum*



# Vandamikið at lækka skattin og seta brúkaragjøld ístaðin



*Tað hjálpir onki uppá lønarkrøvini, at skatturin lækkar eitt sindur, men at alt síðani verður tikið innaftur við brúkaragjøldum, tvørturímóti, segði Gunnleivur Dalsgarð á aðalfundinum í Starvsmannafelagnum*

**– Tað máar støðið undan tí samhaldsfasta samfelagnum, sum vit avgjørt eiga at varðveita og bøta um, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum**

SKATTAPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*

– Vilt tú varðveita eitt samhaldsfast samfelag, er tað vandfamikið at lækka skattin uttan fyrilit fyri at seta brúkaragjøld í gildi í staðin.

Tað var greiði boðskapurin hjá formanninum í Starvsmannafelagnum á aðalfundinum leygardagin.

Hann vísti á, at løgmaður og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, hava aftur boða frá at ætlanin er at lækka skattin so hvørt sum brúkargjøld verða løgd á borgaran og lønartakarin frásigur sær lønarábøtur tí fíggjarliga skal hetta vera tað besta fyri samfelagið.

Men hesum ávaraði formaðurin í Starvsmannafelagnum staðiliga ímóti.

– Vilja vit varðveita tað samhaldsfasta samfelagið, er tað ein vandamikil leið at ganga at lækka skattin uttan fyrilit og at seta brúkaragjøld í gildi í staðin.

Og hann helt avgjørt, at vit eiga at varðveita og at bøta um tað samhaldsfasta samfelagið.

Hann segði eisini, at skulu vit ikki enda í einum samfelag, har tann fíggjarliga sterkasti fær ágóðan, meðan hini fáa »molaranar av húsbóndans borði« er neyðugt við eini rættvísari skattaáseting, og tað skal hon sjálvsagt altíð vera.

## Hvørki meiri ella minni

Gunnleivur Dalsgarðsegði, at politikarin við lóggávumyndugleikanum í hondini kunnu politikarar altíð hækka ella lækka skattin til hvat endamál tað skal verða, samstundis sum vit sita eftir við føvninginum fullum av brúkaragjøldum. Hetta er gjøld, sum vit fullkomuliga verða bundin at og sum vit onki fáa gjørt við og samstundis syndrast samhaldsfasta samfelagið.

– Tað ljóðar kanska sum góður tónleikur í oyrunum á onkrum, at tað er meiri umráðandi, hvussu nógv tú hevur eftir av lønini, enn, hvussu nógv tú fært í løn, tí at skatturin fer við øllum.

– Politikarin eigur at gera sær greitt, at gjøgnum politiska starv sítt skal hann syrgja fyri, at røtt skattaupphædd verður áløgd og at rættvíst verður býtt millum ymsu herðarnar, ið skulu bera.

– Tað er neyðugt at fáa inn neyðuga skattin, ið skal til fyri at reka eitt viðkomandi og samhaldsfast samfelag – hvørki meira ella minni.

– Skal tað verða uppgávan hjá løntakarunum, at taka hesar uppgávur uppá seg, at áseta hvussu og hvat skal gjaldast í skatti, – ja, so er betur at løntakarin tekur yvir stýrisvaldið sjálvur, soleiðis at vit hava trygd fyri, at lønar- og onnur viðurskiftir okkara verða rætt og væl umsitin.

## Hjálpir onki

Og Gunnleivur Dalsgarð staðfesti, at eitt skulu bæði landsins myndugleikar og arbeiðsgevarar annars verða fullkomuliga greiðir yvir. Og tað er, at skal alt takast innaftur við brúkaragjøldum, fer ein skattalækking ístaðin fyri lønarhækking ikki at gera krøvini til beinleiðis lønarábøtur minni.

– Tvørturímóti verður tá neyðugt at hækka lønirnar, so hvørt sum brúkaragjøldini verða áløgd og vaksa.

– Hetta átti at verið rættuliga sjálvsagt,- sjálvt fyri politikkarunum, segði formaðurin í Starvsmannafelagnum.

Hann segði, at nú er spælt út við eini smávegis skattalækking yvir tvey ár og roynt verður at gjara út við, at hetta skal tálma krøvunum til komandi samráðingarnar.

– Tað er ílagi, at politikarin metir, at her er ov nógv tikið inn og tí eigur ein ávísur partur at berast aftur til skattgjaldarin.

Men lat okkum einaferð enn gera greitt okkara, at lønarkrøv verða bygd á tann tørv og ábøtur, sum neyðugur er, segði Gunnleivur Dalsgarð.

HYGG HER
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Brúktir bilar til sølu
Jeep Grand Cherokee 3.1 td
km. 43.500, lj-brúnur, apr'00
320.000,-
Citroen ZX 1.9TD 5h
km. 163.000, grønur, mai'97
85.000,-
Mitsubishi Galant 1.8i
km. 158.000, bláur, jun'89
35.000,-
Citroen Xsara 1.9 td week
km. 77.000, gráur, okt'98
115.000,-
Suzuki Baleno 1.3i
km. 27.500, gráur, apr'00
99.000,-
Citroen Saxo 1.5D 3d
km. 44.000, gráur, jan'01
99.000,-
Citroen Saxo 1.5D
km. 70.000, bláur, okt'97
80.000,-
Citroen Saxo 5h
svartur, jan'02
112.000,-
VØRUVOGNAR
Citroen Jumper 2,5TD
km. 120.000, reyður, 1996
120.000,-
Nissan Serena 2,3D
km. 88.000, bláur, mai'97
88.000,-
Nissan Serena 2,3D
km. 102.000, bláur, mai'97
88.000,-
Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar
Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

# Starvsmannafelagið valt nevnd

Leygardagin hevði Starvsmannafelagið aðalfund fyri 42. ferð.

Í dag eru umleið 1800 limir í Starvsmannafelagnum. Rættiliga nógv fólk var á fundi, har vanlig felagssmál vóru til viðgerðar, sigur felagið í tíðindaskrivi.

Nevndarval var eisini á skránni. Tveir nevnd-arlimir stóðu fyri vali. Teir vóru John Kjær og Selma Ellingsgaard, sum bæði vórðu afturvald.

Hinir nevndarlimirnir í Starvsmannafelagnum eru Gunnleivur Dalsgarð, formaður, Heini Joensen og Suni Selfoss.

Sum tiltakslimir vórðu vald: Karin Elisa Niclasen og Kartni Ravnsfjall.

Beint aftaná aðalfundin hevði eftirlønargrunnur felagsins eisini aðalfund og har vóru John Kjær, Gunnleivur Dalsgarð og Jákup Danielsen afturvaldir í nevndina.

